RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F

**International worldwide cooperation**

Á Glaðsheyggi
Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf (+298) 35 17 00
Fax (+298) 35 17 01
Reg. nr. 3752
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársroknskapur 2007
**(16. roknskaparár)**

## Avrit

# INNIHALDSYVIRLIT

| | Síða |
|---|---|
| Almennar upplýsingar | 2 |
| Roknskaparátekning | 3 |
| Ársfrágreiðing | 4 |
| Grannskoðanarátekning | 5 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 8 |
| Gjaldførisfrágreiðing | 10 |
| Notur til ársroknskapin | 11 |

# ALMENNAR UPPLÝSINGAR

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o TAKS, Suðuroyar Øki
FO-800 Tvøroyri

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Ingeborg Vinther

**Grannskoðan**

**Rasmussen & Weihe**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F

# ROKNSKAPARÁTEKNING

Ársroknskapurin, sum er greiddur av okkum, er settur upp samsvarandi føroyskari lóggávu. Ársroknskapurin gevur eftir okkara tykki eina rættvísandi mynd av bankans ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Ársfrágreiðing og fylgjandi ársroknskapur verður lagdur fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 16. juni 2008

**Stýrið:**

| | |
|---|---|
| Sigurd Poulsen, formaður | Jógvan Vágsheyg, næstformaður |
| Gunnvør Dam Jensen | Ingeborg Vinther |

Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi hin / - 2008

Fundarstjóri

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 1½ % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda 1½ % av útgoldnu A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997.

## Fíggjarlig lýsing

Í árinum er inngjaldið til grunnin frá løntakarum og arbeiðsgevarum økt við tkr. 82.546, og hetta kemst serliga av øktum lønarútgjaldingum, eins og gjaldið er hækkað úr 1% til 1½% av inngjaldsgrundarlagnum hjá skattskyldugum løntakarum og arbeiðsgevarum. Løgtingið hevur samtykt framhaldandi at økja um inngjaldið til grunnin soleiðis, at inngjaldsprosentið fyri 2008 verður 1,75 %.

Útgjaldingin til pensjónistar er økt frá tkr. 82.031 í 2006 til tkr. 125.846 í 2007 og skyldast hetta, at mánaðarliga gjaldið er økt úr kr. 1.185 í 2006 til kr. 1.860 við gildi frá 1. februar 2007. Fyri 2008 er gjaldið ásett til kr. 2.230.

Aðrar útreiðslur, avsetingar og tap uppá skuldarar eru nakað hægri enn undanfarna ár.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2007 eitt avlop uppá tkr. 87.519 ímóti einum avlopið uppá tkr. 49.263 í 2006.

Fíggjarligu postarnir netto eru minkaðir við tkr. 3.335 í mun til undanfarna ár.

## Úrslit

Ársúrslitið í 2007 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 101.884 ímóti einum avlopi uppá tkr. 66.963 fyri 2006.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 2007 tkr. 542.108.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Framtíðin

Vøksturin í inngjøldum má roknast at halda áfram, tí inngjaldsprosentini koma at økjast enn meira.

Mánaðarliga upphæddin til arbeiðsmarknaðareftirløn, var sum nevnt, í 2007 kr. 1.860, meðan gjaldið fyri 2008 er sett til kr. 2.230 pr. mánaða. Harvið koma útgjaldingarnar at økjast í 2008.

Búskapargongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan á inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina.

Gongdin á fíggjarmarknaðinum hevur stóra ávirkan á fíggjarinntøkurnar hjá grunninum.

Samanumtikið verður roknað við einum avlopi í 2008, sum verður hægri enn í 2007.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálvseigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava 4 limir og sum verður valt fyri eitt 3 ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi Tryggingarfelagið Føroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønagrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2007.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvar við góðan roknskaparsið. Henda ábyrgd ber í sær, at grunnurin støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2007 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2007 samsvarandi galdandi lóggávu.

Tórshavn, hin 16. juni 2008

**Rasmussen & Weihe**
Statsaut. grannskoðarafelag P/F

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Joen Magnus Lamhauge |
| statsaut. revisor | reg. revisor |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**

Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðan roknskaparsið.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í tráð við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum hesin:

**Inntøkur**

Inntøka grunsins – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1½ % av skattskyldugu inntøkuni í 2007 sambært fyribilsskattaskrásetingini, umframt reguleringar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða endaliga uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støddd, at tær hava týðandi ávirkan á roknskapin.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarkn. eftirlønargjaldið gjørt upp sum 1½ % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2007.

**Áogn**

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

**Lánsbrøv og partabrøv**

Lánsbrøv og partabrøv eru upptikin til kursvirðið við endan av roknskaparárinum.

**Tíðaravmarkingar, áogn**

Upphæddin umfatar útreiðslur í árinum, sum viðvíkja næsta árinum.

**Skattur**

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Nota | 2007 | *2006* *(t.kr.)* |
|---|---|---|---|
| Nettoinntøka | 1 | 218.124.648 | *135.579* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -125.846.410 | *-82.031* |
| Aðrar útreiðslur | | -1.749.447 | *-1.832* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -3.009.682 | *-2.453* |
| | | **87.519.109** | ***49.263*** |
| Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti | 3 | 209.092 | *802* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap | 4 | -2.046.089 | *6.744* |
| Rentuinntøkur | 5 | 16.201.886 | *10.154* |
| | | **14.364.889** | ***17.700*** |
| **Ársúrslit** | | **101.884.000** | ***66.963*** |
| **Býti av úrsliti:** | | | |
| At flyta til næsta ár | 7 | **101.884.000** | ***66.963*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| | Nota | 2007 | *2006* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| **AKTIV** | | | |
| Áogn | 6 | 14.827.400 | *11.327* |
| Tíðaravmarking | | 11.992.890 | *7.091* |
| **Áogn íalt** | | **26.820.290** | ***18.418*** |
| Lánsbrøv og partabrøv | | 290.282.270 | *286.271* |
| Tøkur peningur | | 226.120.535 | *136.672* |
| **Íalt** | | **516.402.805** | ***422.943*** |
| **Umferðarfæ í alt** | | **543.223.095** | ***441.361*** |
| **AKTIV Í ALT** | | **543.223.095** | ***441.361*** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| | Nota | 2007 | *2006* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| **PASSIV** | | | |
| **Eginogn** | 7 | **542.107.530** | ***440.224*** |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 191.210 | *191* |
| Onnur skuld | | 924.355 | *946* |
| **Skuld í alt** | | **1.115.565** | ***1.137*** |
| **PASSIV Í ALT** | | **543.223.095** | ***441.361*** |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

# GJALDFØRISFRÁGREIÐING PR. 31. DESEMBER

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| Ársúrslit | 101.884.000 | *66.963* |
| Broytingar í ogn og skuld grunsins: | | |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, arbeiðsgevarar | 1.288.425 | *42.586* |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | -4.789.119 | *-2.099* |
| Tíðaravmarkingar | -4.901.445 | *-239* |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | 0 | *10* |
| Onnur skuld | -21.894 | *254* |
| Gjaldførisúrslit fyri árið | 93.459.967 | *107.475* |
| Gjaldførið pr. 1. januar | 422.942.838 | *315.468* |
| Gjaldførið pr. 31. desember | **516.402.805** | ***422.943*** |

**Sundurgreining av gjaldføri:**

| | | |
|---|---|---|
| Lánsbrøv og partabrøv | 290.282.270 | *286.271* |
| Tøkur peningur | 226.120.535 | *136.678* |
| | **516.402.805** | ***422.949*** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2007 | *2006* *(t.kr.)* |
|---|---|---|
| **1. Nettoinntøka** | | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 112.152.695 | *70.103* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 105.971.953 | *65.476* |
| **Nettoinntøka íalt** | **218.124.648** | ***135.579*** |

Nettoinntøkan – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1½ % (2006: 1%) av skattskyldugu inntøkuni fyri 2007 sambært fyribilsskattaskrásetingini, umframt reguleringar fyri inngjøld undanfarin ár. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum 1½ % (2006: 1%) av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2007.

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| **2. Avsetingar og tap uppá skuldarar** | | |
| Broyting í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | -500.000 | *-451* |
| Strikað krav, arbeiðsgevarar ið ikki skulu gjalda AM-gjald | -2.213.449 | *-1.856* |
| Avskrivað krav um AM-gjald, arbeiðsgevarar | -271.072 | *-133* |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -25.161 | *-13* |
| **Avsetingar og tap uppá skuldarar íalt** | **-3.009.682** | ***-2.453*** |

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| **3. Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti** | | |
| Vinningsbýti partabrøv | 1.081.844 | *1.085* |
| Staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | -156.965 | *2.261* |
| Staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | -402.228 | *-1.979* |
| Handilskostnaður | -313.559 | *-565* |
| **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti íalt** | **209.092** | ***802*** |

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| **4. Ikki staðfestur kursvinningur/tap** | | |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 356.773 | *7.754* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | -2.402.862 | *-1.010* |
| **Ikki staðfestur kursvinningur/tap íalt** | **-2.046.089** | ***6.744*** |

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| **5. Rentuinntøka** | | |
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 177.869 | *261* |
| Renta av lánsbrøvum | 10.195.539 | *7.979* |
| Renta av innistandandi | 5.828.478 | *1.914* |
| **Rentuinntøka íalt** | **16.201.886** | ***10.154*** |

## NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2007 | *2006* |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| **6. Áogn** | | |
| AM-gjald fyri gomul ár, arbeiðsgevarar | 566.978 | *441* |
| AM-gjald fyri roknskaparárið, arbeiðsgevarar | 3.753.679 | *4.668* |
| AM-gjøld løntakarar | 11.706.743 | *6.918* |
| Avsett móti tapi | -1.200.000 | *-700* |
| **Áogn íalt** | **14.827.400** | ***11.327*** |

| | | |
|---|---|---|
| **7. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 440.223.530 | *373.261* |
| Ársúrslit | 101.884.000 | *66.963* |
| **Eginogn ultimo** | **542.107.530** | ***440.224*** |

**8. Møguligar aðrar skyldur**

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.